# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein



## FORSETAKONAN TALAR

Hon er kona amerikanska forsetan George W. Bush, men hon gjørdi ikki so nógvan háva burtur úr sær sum forsetafrúa. Nú hevur Laura Bush skrivað sínar endurminningar. Hon greiðir frá uppvøkstrinum sum einabarn í eini familju, sum misti trý børn beint fyri ella beint eftir føðing, og hvussu hon endaði í Hvítu Húsunum. Laura Bush sigur eisini søguna um mannin, sum drakk illa, men megnaði at gevast – og endaði sum amerikanskur forseti.

**LAURA BUSH**
Spoken From The Heart
Simon & Schuster Ltd



## BÁTASTEVNA Í VESTMANNA

Seinastu átta árini hevur árlig bátastevna verið í Vestmanna, og nú vit koma inn í hálvan mai verður ársins stevna hildin. Umframt teir mongu bátarnar, sum savnast í Vestmanna, koma fólk eisini við húsvognum. Ymiskt tiltøk verða á skránni fríggjadagin og leygardagin.

**BÁTASTEVNA**
Vestmanna
Fríggjadagin 14/5 og leygardagin 15/5



## LEGENDARISK STEYPAFINALA

Kendasta steypakappingin í fótbólti er helst enska FA Cup kappingin, og leygardagin verður finalan í hesi kapping spæld. Í finaluni eru ensku meistararnir Chelsea og niðurflytararnir Portsmouth. Chelsea kann vinna greipuna leygardagin, ella skapar Portsmouth eina óvanliga ævintýrsøgu við at vinna steypakappingina.

**CHELSEA-PORTSMOUTH**
FA Cup finala
Leygardagin 15/5 kl. 15.00



## STÓR KONSERT Í SILO

Leygardagin verður stóra saltsilokonsertin á Drelnesi í Suðuroy. Ein rúgva av kendum tónleikarum fara at spæla á stuðulskonsertini til frama fyri siloprojektið. Teirra millum eru Frændur, Teitur Lassen, Jens Marni Hansen, Hallur Joensen, Tinganest, Brandur Enni og fleiri. Íroknað atgongumerkjaprísin er ferðingin við Smyrli.

**SILOKONSERT**
Drelnes
Leygardagin 15/5 kl. 18.30



## PÍLAGRÍMSGONGA ÚR ØRAVÍK

Sunnudagin verður pílagrímsgonga í Suðuroynni. Gingið verður úr Øravík til Fámjins. Byrjað verður við stuttari gudstænastu í Bønhúsinum. Síðan verður gingið eftir gomlu bygdagøtuni um tingstovuna niðan á Mannaskarð. Har verður ein steðgur og matpakki etin. Haðani verður so gingið til Fámjins, har endað verður við gudstænastu í Fámjins kirkju. Tað verður eisini steðgað á við ávís støð á leiðini, har komið verður við nøkrum hugleiðingum og sálmur verður sungin.

**PÍLAGRÍMSGONGA**
Úr Øravík til Fámjins
Sunnudagin 16/5 kl. 13.00



## THE ROAD

Ein pápi og sonurin ganga ígjøgnum eitt oyða landslag. Øska er í luftini, kuldin bítandi og kavin gráur. Teir hava bert ein revolvara at verja seg við ímóti teimum lógleysu, og málið fyri ferðini er strondin. Filmurin byggir á skaldsøgu við sama navni, sum í 2007 fekk amerikansku Pulitzer virðislønina. Høvuleiðsleikari í filminum er Viggo Mortensen

**THE ROAD**
dvd-filmur